**Vegleiðing í sambandi við løgtingslóg um barnaváttanir**

# Uttanríkis- og mentamálaráðið

**Innihald:**


1. Inngangur (s. 1-2)
2. At seta í starv og at seta til ávísa uppgávu (s. 2)
3. Hvat er ein barnaváttan? (s. 2)
4. Hvussu fær man eina barnaváttan? (s. 3)
5. Hvør skal fáa barnaváttanina til vegar? (s. 3-4)
6. Nær skal barnaváttanin fáast til vegar? (s. 4)
7. Hvussu ofta skal barnaváttan fáast til vegar? (s. 4-5)
8. Hvat um barnaváttanin ikki verður fingin til vegar, ella um hon vísir á revsiverd viðurskifti? (s. 5)
9. Dátuverndarlógin (s. 6)
10. Útlendingar (s. 6)
11. Vegleiðandi listi yvir stovnar, felagsskapir o.a., har tað krevst barnaváttan, um starvið ella uppgávan ber í sær beinleiðis og regluligt samband við børn og ung undir 15 ár, (s. 6-7)


## 1. Inngangur

Barnaváttanarlógin kom í gildi 1. juni 2022, og er hon tann fyrsta av sínum slag í Føroyum. Til ber at lesa lógina her.

Endamálið við lógini er at fyribyrgja kynsligum ágangi móti børnum og ungum undir 15 ár. Ítøkiliga ber lógin í sær, at arbeiðsgevarar s.s. almennir stovnar, feløg og felagsskapir, ið seta persónar í starv ella til uppgávu, sum koma í **beinleiðis og regluligt** samband við børn undir 15 ár, skulu fáa til vegar eina barnaváttan. Barnaváttanin vísir, um persónur er ella hevur verið skuldsettur, ákærdur, dømdur o.l. í málum um kynsligan ágang ímóti børnum. Um barnaváttanin vísir, at persónur er *dømdur*, er bannað at seta viðkomandi í starv ella til ávísa uppgávu, sbr. § 9 í lógini.

Barnaváttanarlógin løgskipar hinvegin ikki, um arbeiðsgevarar sjálvboðið krevja privatar revsiváttanir ella fáa myndugleikarevsiváttanir til vegar í sambandi við setanir. Tað er eitt annað slag av váttan, sum ikki er fevnt av barnaváttanarlógini. Nærri kunning um revsiváttanir fæst við at venda sær til løgregluna og á heimasíðuni her.

## 2. At seta í starv og at seta til ávísa uppgávu

Lógin skilir millum at seta í starv og at seta til ávísa uppgávu.

Við *starvssetan* er at skilja eitt ”vanligt” starv s.s. at vera lærari, dagrøktari, námsfrøðingur, hjálparfólk, tannrøktari o.o. heilsustarvsfólk. Tað kann eisini vera talan um onnur størv, sí vegleiðandi lista aftast á hesi vegleiðing. GG: Listin er ikki úttømandi!

At verða settur til *ávísa uppgávu* er t.d. at verða settur sum venjari, kamarsleiðari, skótaleiðari o.l.

Í báðum førum skal starvið ella uppgávan bera í sær **beinleiðis og regluligt** samband við børn og ung undir 15 ár. Treytin um beinleiðis og regluligt samband skyldast, at tað á tann hátt kann uppbyggjast eitt álit millum barnið og viðkomandi. Hetta er galdandi sama um starvið ella uppgávan er lønt ella ólønt, ella um starvið ella uppgávan er varandi ella tíðaravmarkað.

Frá at tað hevur verið sjálvboðið, ger barnaváttanarlógin tað til eina skyldu hjá eitt nú kommunum, almennum og privatum stovnum, ítróttarfeløgum, felagsskapum, samkomum o.ø., at fáa til vegar eina barnaváttan, **áðrenn** persónur verður settur í starv ella til ávísa uppgávu, sí tó pkt. 6 niðanfyri.

Viðmerkjast skal, at skyldan at fáa til vegar eina barnaváttan kann eisini fevna um onnur enn tann, ið ætlanin er at seta í starv. Hetta ger seg galdandi, um starvið fer fram heima hjá viðkomandi. Her verður serliga hugsað um dagrøktarar. Treytin er tá, at arbeiðsgevari fær til vegar barnaváttan um hjúnafelagar, sambúgvar, heimabúgvandi børn yvir 15 ár o.o., sum kunnu fáa møguleika at koma í beinleiðis og regluligt samband við børn undir 15 ár, sbr. § 4, stk. 2 í lógini.

## 3. Hvat er ein barnaváttan?

Ein barnaváttanin er eitt serligt slag av revsiváttan, ið inniheldur upplýsingar um skuldsetingar, dómar, ákærufráfall v.m., í málum, ið snúgva seg um brotsgerðir móti børnum og ungum undir 15 ár. Ítøkiligu revsimálini standa í kunngerð fyri Føroyar um Det Centrale Kriminalregister, sum varð sett í gildi fyri Føroyar tann 1. apríl 2021.

Ein barnaváttanin minnir um eina revsiváttan, men er kortini øðrvísi, tí upplýsingarnir standa á váttanini í munandi longri tíðarskeið samanborið við eina revsiváttan. Tað stytsta tíðarskeiðið er 10 ár frá tí tíðspunkti, at t.d. persónur hevur sitið dómin, ella at ákæran bleiv slept. Harnæst er tað 20 ár, ella til viðkomandi er vorðin 80 ár. Hvussu leingi brotini standa á barnaváttanini, veldst m.a. um slag av broti, og hvør avleiðingin av brotinum var fyri tann skrásetta. Av tí at ein barnaváttan er ein sonevnd myndugleikaváttan, er tað bert tann, ið setur í starv ella setur til uppgávu, ið kann fáa barnaváttanina til vegar.

Í mun til aðrar revsiváttanir er ein barnaváttan innihaldsliga avmarkað til bert at fevna um ávís revsilógarbrot, ið standa nevnd í § 36 í kunngerðini um Det Centrale Kriminalregister.

### 4. Hvussu fær man eina barnaváttan?
*(Brotið er skrivað av fútanum)*

Tað er det *Centrale Kriminalregister*, sum útflýggjar barnaváttanir.

Tá ið ein barnaváttan skal fáast til vegar, skal arbeiðsgevari, felagsskapur o.o., sum koma undir breiða arbeiðsgevarahugtakið í lógini, nýta serligt oyðublað til endamálið. Oyðublaðið liggur á heimasíðuni hjá Føroya Politi her.

Arbeiðsgevarin skal fylla oyðublaðið út. Viðkomandi starvsfólk ella umsøkjari, ið váttanin snýr seg um, skal á oyðublaðnum skrivliga samtykkja, at arbeiðsgevarin biður um barnaváttan um viðkomandi. Arbeiðsgevarin kann ikki heinta barnaváttan uttan samtykki frá viðkomandi.

Tá ið viðkomandi starvsfólk ella umsøkjari hevur givið sítt skrivliga samtykki, skal arbeiðsgevarin senda oyðublaðið til Det Centrale Kriminalregister.

Av tí at talan kann vera um viðkvæmar persónupplýsingar, hevur Det Centrale Kriminalregister, sum er fevnt av danskari dátuverndarlóggávu, strangar reglur um, hvussu umbønir um barnaváttanir kunnu móttakast, og hvussu barnaváttanir verða sendar til umsøkjara.

Det Centrale Kriminalregister viðgerð einans umbønir, sum verða sendar umvegis tryggan teldupost. Fyri at lúka trygdarkrøvini, skal arbeiðsgevarin taka eitt forrit niður á telduna. Forritið kann heintast her.

Tá trygdarforritið er tikið niður, kann oyðublaðið sendast til mvjyl-pac-kr@politi.dk.

Málsviðgerartíðin hjá Det Centrale Kriminalregister er vanliga uml. 10 yrkadagar.

Hevur arbeiðsgevarin ikki teldupost, sum lýkur nevndu trygdarkrøv, skal arbeiðsgevarin lata útfylta oyðublaðið inn til Føroya Politi á staðnum. Til ber at lata oyðublaðið inn á øllum avgreiðslum hjá Føroya Politi.

Føroya Politi sendir síðani oyðublaðið umvegis tryggan teldupost til Det Centrale Kriminalregister, sum so sendir Føroya Politi barnaváttanina aftur. Arbeiðsgevarin kann síðani heinta barnaváttanina á avgreiðslu hjá Føroya Politi. Roknast má tá við at málsviðgerðartíðin verður nakað longri, um hesin leistur verður nýttur.

Sí nærri kunning her.

### 5. Hvør skal fáa barnaváttanina til vegar?

Um arbeiðsgevari lýsir eftir fólki at seta í starv, skal greitt tilskilast í starvslýsingini, at arbeiðsgevarin hevur skyldu til at fáa barnaváttan til vegar, áðrenn setanin verður framd, sbr. § 4, stk. 3 í lógini.

Um eitt felag ella ein felagsskapur hinvegin biður persón um at átaka sær eina uppgávu fyri felagsskapin, er nokk at felagsskapurin kunnar viðkomandi um skylduna hjá felagnum ella felagsskapinum at fáa til vegar eina barnaváttan, áðrenn viðkomandi verður settur til uppgávuna. Um tað av praktiskum orsøkum ikki er gjørligt hjá felagi ella felagsskapi at fáa

eina barnaváttan til vegar, áðrenn persónur skal setast til uppgávu, er ein freist ásett í lógina, sí nærri um hetta undir pkt. 6. Felagið ella felagsskapurin fer tá eftir oyðublaðnum, fær neyðuga samtykki til vegar og søkir so um barnaváttan, sí punkt. 4 omanfyri.

Í einum almennum stovni er tað vanliga stjórin ella tann, ið stjórin hevur lutað sínar heimildir til, ið fær barnaváttanina til vegar. Í einum felagsskapi er tað vanliga umboð fyri nevndina ella stýrið, ella tann, ið stýrið hevur lutað sínar heimildir til t.d. ein dagligur leiðari, ið innheintar barnaváttanina.

Í viðmerkingunum til lógina stendur, at tað ikki krevst barnaváttan, um starvið ella uppgávan *ikki* ber í sær beinleiðis og regluligt samband við børn undir 15 ár. Hetta merkir, at um onkur í styttri tíðarskeið kemur at gera ítøkiligar uppgávur, ið falla uttanfyri vanliga virksemið hjá viðkomandi stovni ella felagsskapi, er tílík uppgáva ikki fevnd av lógini. Eitt dømi kundi verið, at málari, sum skal mála dagstovnahúsini, ella um fyrilestrarhaldari skal halda fyrilestur í einum fólkaskúla.

## 6. Nær skal barnaváttanin fáast til vegar?

Í summum førum er ógjørligt at fáa til vegar barnaváttan, áðrenn persónur verður settur til *ávísa uppgávu*. Sum dømi kann nevnast, at tað er vanligt, at summarlegurnar ikki fáa seinastu leguleiðararnar fyrr enn í síðstu løtu. Tí er eitt undantak í lógini, har ásett er, at um tað av praktiskum orsøkum ikki er gjørligt at útvega barnaváttan, áðrenn viðkomandi verður settur *til ávísa uppgávu*, ið ber í sær beinleiðis og regluligt samband við børn undir 15 ár, skal barnaváttanin verða fingin til vegar skjótast gjørligt og í seinasta lagi 4 vikur eftir, at viðkomandi er settur til uppgávuna, sbr. § 4, stk. 4 í lógini.

Undantakið er ikki galdandi fyri starvssetanir, sbr. § 4, stk. 5 í lógini. Hetta skyldast, at tað hevur verið ein setanartilgongd frammanundan, har arbeiðsgevari hevur havt rímiligt høvi at fáa barnaváttan til vegar, áðrenn viðkomandi verður settur í starv.

Ein barnaváttan er fingin til vegar, tá ið arbeiðsgevarin hevur fingið barnaváttanina í hendi.

Barnaváttanarlógin kom í gildi 1. juni 2022, og hon fevnir um setanir og uppgávur, ið vera framdar frá og við hesum degi. Ásett er tó í § 5 í lógini, at setan í *starv* hjá sama arbeiðsgevara ikki er at meta sum ein nýggj setan. Sum dømi merkir tað, at ein fólkaskúli ikki skal útvega barnaváttanir fyri teir lærarar, ið longu eru í starvi, ella tá ið lærarar í fleiri samanhangandi tíðaravmarkaðum starvi verða endursettir í sama fólkaskúla uttan ónátúrligt brot í tíðarskeiðnum.

Tá ið tað hinvegin kemur til at seta til ávísa *uppgávu*, skulu eitt nú frítíðarfelagsskapir útvega barnaváttan tað fyrsta árið - sama um setanin er hjá sama arbeiðsgevara ella ikki.

Verða summarlegurnar tiknar sum dømi, skal viðkomandi felagsskapur - fyrstu ferð eftir at lógin er komin í gildi – útvega barnaváttanir í sambandi við ta fyrstu leguna. Tá felagsskapurin so skipar fyri fleiri legum sama ár, eftir at barnaváttan er útvegað, skal felagsskapurin ikki útvega barnaváttanir fyri tey, ið hava verið sett til ávísa uppgávu á leguni frammanundan. Í teimum førum verða tey fevnd av undantakinum í § 5, ið snýr seg um nátúrlig brot, sí nærri um hetta í punkti 7 niðanfyri.

### 7. Hvussu ofta skal barnaváttan fáast til vegar?

Tá ið barnaváttan er fingin til vegar fyrstu ferð, er tað í prinsippinum upp til einstaka arbeiðsgevaran sjálvan at gera av, hvørt barnaváttan skal innheintast fleiri ferðir. Lógin ásetur, at barnaváttan ikki noyðist at fáast til vegar, tá ið viðkomandi verður settur í nýtt starv, ella verður settur til nýggja uppgávu *hjá sama arbeiðsgevara*. Tað sama er galdandi, tá ið viðkomandi verður endursettur, um brotið er orsakað av *natúrligum broti*, so sum summarferiu, nýggjum tíðarskeiði, bygnaðarligari umskipan ella endurnýggjan av tíðaravmarkaðum starvi, har samanhangur í tíð er millum ta gomlu og ta nýggju setanina, sbr. § 5 í lógini. Sambært viðmerkingunum til lógina er eitt natúrligt brot t.d. summarferia, nýtt venjingarár, vanligur steðgur í virkseminum s.s. árligar legur, árlig venjingarskeið. Um brotið hinvegin skyldast, at viðkomandi sjálvur frávelur at vera venjari ella kamarsleiðari ávíst ár, er treytin um natúrligt brot ikki lokin, og tí skal nýggj barnaváttan fáast til vegar, tá ið viðkomandi verður settur aftur.

Undantakið í lógini viðvíkjandi tíðaravmarkaðari setan vendir sær serliga móti teimum størvum, har siðvenja er at endurseta starvsfólk. Hóast talan formliga er um nýggja setan, er tað í roynd og veru talan um sama starv. Eitt nú er tað vanligt í fólkaskúlanum, at summir lærarar starvast í áravís á sama skúla, men teir verða settir av nýggjum hvørt skúlaár.

Tað er tó ein treyt, at talan er um sama arbeiðsgevara, og at størvini eru samanhangandi í tíð – tað vil t.d. siga, at um lærarin, ið starvast í tíðaravmarkaðum starvi frá 1. august til 31. juli, síðani verður settur aftur í starv frá 1. august til 31. juli fylgjandi skúlaár *í sama skúla*, so er ikki neyðugt at útvega nýggja barnaváttan. Er brotið hinvegin longri, krevst nýggj barnaváttan.

### 8. Hvat um barnaváttanin ikki verður fingin til vegar, ella um hon vísir á revsiverd viðurskifti?

Um barnaváttanin ikki verður fingin til vegar, verður tað revsað við bót í hvørjum einstøkum føri, sbr. § 10 í lógini. Um barnaváttanin vísur á revsiverd viðurskifti, er tað sambært leiðslurættinum upp til arbeiðsgevaran sjálvan at meta um, hvørt brotið er so mikið álvarsligt, at viðkomandi ikki kann setast í starv ella til uppgávu. Um barnaváttanin hinvegin vísir, at persónur er *dømdur* fyri kynsligt brotsverk ella kynsligan harðskap móti børnum undir 15 ár, er bannað arbeiðsgevaranum at seta viðkomandi í starv ella til ávísa uppgávu, sbr. § 9 í lógini.

Uttan so at talan er um ein *dømdan* persón, ásetur fyrisitingarrætturin - ið bert er galdandi fyri almennar *myndugleikar* - at myndugleikin altíð hevur skyldu til at gera eina ítøkiliga meting av øllum sakligum og viðkomandi fyrilitum. Sambært Ársfrágreiðingini frá Fólkatingsins umboðsmanni í 2011 kann ein myndugleiki ikki frammanundan skúgva skylduna at gera ítøkiligar metingar til viks við at áseta í egnum leiðreglum o.l., at bert persónar við reinum barnaváttanum verða settir í starv. Fólkatingsins umboðsmaður vísir á, at metast skal um hesi viðurskifti:

1) Fevnir starvið um veikar borgarar?
2) Setir starvið serlig krøv til álit?

3) Hvat fyri slag av revsilógarbroti hevur talan verið um?
4) Hvussu long tíð er fráliðin?
5) Hvør var orsøkin til lógarbrotið?
6) Bleiv viðkomandi frífunnin?
7) Onnur saklig og viðkomandi fyrilit

Innan privata geiran kunnu felagsskapir s.s. ítróttarfeløg, samkomur o.o. gera sínar egnu reglur, tí tað privata er ikki fevnt av fyrisitingarrættinum.

### 9. Dátuverndarlógin?

(*Brotið er skrivað av Dátueftirlitinum*)

At fáa barnaváttan til vegar er viðgerð av persónupplýsingum um tann, ið barnaváttanin viðvíkur, og tað er tí fevnt av dátuverndarlógini. Allir stovnar skulu hava mannagongdir fyri viðgerð av persónsupplýsingum. Persónligir upplýsingar skulu viðgerast í trúnaði og vera vardir ímóti tilvildarligum missi, fyribeining ella skaða. Viðgerðin av persónupplýsingum skal hava eitt hóskandi trygdarstøði. Stendur einki revsivert á barnaváttanini, er talan um vanligar persónsupplýsingar. Vísir barnaváttanin hinvegin á revsiverd viðurskifti s.s. um skuldsetingar, dómar, ákærufráfall, er talan um viðkvæmar persónsupplýsingar.

Hvussu farast skal fram eftir, at barnaváttanin er fingin til vega, veldst um, hvørt talan er um ein almennan ella ein privatan arbeiðsgevara.

**Ein privatur arbeiðsgevari**, ið hevur fingið eina barnaváttan til vegar, kannar, um barnaváttanin vísur á revsiverd viðurskifti. Privati arbeiðsgevarin skrásetur, at viðkomandi hevur sæð barnaváttnina og beinir hana síðani burtur á nøktandi hátt. Hetta eigur at verða gjørt á slíkan hátt, at eingin óviðkomandi fær atgongd til barnaváttanina ella skránna.

Endamálið við at skráseta innkomnar barnaváttanir er til tess at tryggja, at arbeiðsgevarin kann skjalprógva, at barnaváttanir eru fingnar til vega, samstundis sum arbeiðsgevarin fær eitt yvirlit yvir teir persónar, sum arbeiðsgevarin hevur fingið barnaváttanir um, og sum tí eru fevndir av undantaksregluni í § 5 í barnaváttanarlógini, sbr. pkt. 7 omanfyri.

**Allir almennir arbeiðsgevarar** eiga at halda vanligu fyrisitingarreglarnar, har tað er skylda at skráseta skjøl. Av tí at barnaváttanin er partur av setanarmáli, verður mælt til, at hon verður goymd og skrásett í viðkomandi persónsmáli. Eisini seta reglurnar í skjalasavnslóggávuni avmarkingar fyri, nær almennir myndugleikar kunnu strika upplýsingar.

Viðkomandi starvsfólk ella umsøkjari, ið váttanin snýr seg um, skal geva skrivligt samtykki til, at arbeiðsgevarin fær barnaváttan um viðkomandi og hevur rætt at síggja tær persónupplýsingar, sum arbeiðsgevarin viðgerð um viðkomandi.

### 10. Viðvíkjandi útlendingum

Um t.d. føroyskt ítróttarfelag fær ein útlending at vera ungdómsvenjara, er skyldan at fáa til vegar eina barnaváttan galdandi. Av tí at Kriminalregisteret einans skrásetir lógarbrot, ið eru framd, meðan persónur hevur búð í danska ríkinum, eru ongir upplýsingar frá heimlandinum

hjá viðkomandi í donsku skrásetingini. Tað er heldur ikki vist, at heimlandið hevur skipan við barnaváttanum, eins og revsirætturin kann vera ymiskur frá landi til land.

### 11. Vegleiðandi listi yvir stovnar, felagsskapir o.a., har tað krevst barnaváttan um starvið ella uppgávan ber í sær beinleiðis og regluligt samband við børn og ung undir 15 ár *(listin er ikki úttømandi)*:

1) Ítróttarfelagsskapir og ítróttarfeløg
2) Fólkaskúlar
3) Dagstovnar
4) Familjufyrisiting
5) Tónleikaskúlar
6) Frítíðarfelagsskapir, ið hava við børn og ung at gera
7) Eftirskúlar
8) Frískúlar
9) Ballett og dansiskúlar
10) Ríðiskúlar
11) Aðrir serligir skúlar til børn og ung undir 15 ár
12) Skótar
13) Søvn
14) Kór
15) Sjónleikarhús, áhugaleikhús, mentanarhús
16) Mentanarstovnar og mentanarligir felagsskapir
17) Kringvarpsstøðir
18) Bókasøvn
19) Sjúkrahús og aðrir heilsustovnar
20) Sernámsfrøðiligir stovnar
21) Stovnar, feløg og felagsskapir, ið arbeiða við viðurskiftum hjá børnum og ungum
22) Skúlabarnaflutningur
23) Barnaverndartænastur
24) Barnaheim og sambýli við børnum og ungum undir 15 ár
25) Fosturforeldur
26) Barnatannrøktir
27) Ung í arbeiði
28) Privatar barnaansingarfyritøkur
29) Kirkjur og samkomur
30) Svimjihallir
31) Persónar, sum sjó- ella loftvegis skulu taka sær av børnum og ungum t.d. flogternur